2 daga skeið

# Økonomi fyri ikki-økonomar

## - grundleggjandi økonomi og fíggjarætlanararbeiði

Betra um tínir førleikar innan fíggjararbeiði

- Fá betri fatan av fíggjarligu samanhangunum í tíni fyritøku
- Lær trygt og einfalt at gera fíggjarætlanir, sum halda
- Fíggjarligar frágreiðingar – les, skil og skriva tær betri
- Soleiðis verður tú betri at formidla og at leggja fram fíggjarligar spurningar




“Skeiðleiðarin dugur at gera eitt turrisligt evni bæði áhugavert og undirhaldandi...”

Skeiðið er eitt samstarv millum Synergi & Confex

Confex

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - 322355 - 222355 - 227464

# Vilt tú betra um tína fatan fyri økonomi og fíggjarstýring?

**So er hetta skeiðið fyri teg!**
Tú situr kanska við eini fíggjarligari ábyrgd í tínum arbeiði, og kortini tørvar tær betri fatan av fíggjarligu samanhangunum á arbeiðsplássinum. Gjøgnum báðar skeiðsdagarnar verður títt innlit í fíggjarstýring og ger av fíggjarætlanum ment, og tú verður kunnug/-ur við grundleggjandi orðingar og meginreglur í búskapi.

**Tú lærir m.a.**

- Hvussu tú lesur og skilur fíggjarfrágreiðingar
- Hvussu tú á ein virknan hátt ger haldgóðar fíggjarætlanir
- Hvussu tú heldur skil útreiðslunum við góðum rutinum
- Hvussu tú leggur fram og formidlar búskaparlig evni við slagkraft og sannføring

Undirvísarin vil á ein inspirerandi hátt og við góðum undirvísingarlag vísa tær hugtøk í búskaparheiminum umframt tær avbjóðingar, sum eru. Undirvísingin skiftir millum teori og praktiskar royndir. Á tann hátt fært tú bestu fortreytirnar at arbeiða málrættað við økonomi og at taka røttu fíggjarligu avgerðirnar, tá ið tú hevur tørv á tí.

**Skeiðið er fyri teg,** sum fylgir eini fíggjarætlan, ger fíggjarætlanir, stýrir útreiðslum, skal søkja um fleiri pengar, hevur ábyrgd av fíggjarligum avgerðum, greinar og týðir fíggjarætlanarhall, samskiftir við tey, ið taka avgerðir í fíggjarspurningum ella ger, lesir og greinar búskaparfrágreiðingar.

**Tilmelding**
Melda teg til longu í dag á www.synergi.fo. Tú kanst eisini ringja ella senda okkum ein teldupost. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Anniku ella Ásu hjá Synergi á tel. 322 355 ella á t-post synergi@synergi.fo.

**Vælkomin á skeiðið!**

Blíðar heilsanir
Synergi í samstarvi við Confex Danmark A/S

## ONNUR SKEIÐ HJÁ SYNERGI

- 25. mars - Um strongd og um ikki at brenna út, 1 dagur***
- 09. apríl - Enneagram modul II, 4 dagar
- 15. apríl - Excel 1 - tey fyrstu fetini, 2 dagar**
- 29. apríl - Online marketing - Google v.m., 2 dagar
- 03. mai - Kom í gongd við at brúka teldu, 2 dagar**
- 06. mai - Starvsfólkahondbókin, 1 dagur
- 25. mai - The very best of Excel, Word, Outlook & PowerPoint, 2 dagar*
- 16. sept. - At leiða onnur uttan at vera leiðari, 2 dagar
- 30. sept. - Framløguteknikkur, 1 dagur
- 08. okt. - Soleiðis handfer tú trupul fólk

* Tekna teg áðrenn 9. apríl og SPAR 25%
** Excel SPAR 19% - Kom í gongd... SPAR 32%
*** Tekna 3 luttakarar og nr. 3 fær 50% í avsláttur

**Hava tit tørv á einum skeiði innanhýsis á tykkara arbeiðsplássi** ella einum spennandi degi ella tíma við kompetentum fyrilestrarhaldarum? Setið tykkum í samband við Ásu ella Anniku á tel. 322 355 og hoyr nærri, hvat vit hava at bjóða.

# SKRÁ

## DAGUR !

08.30 Skráseting og morgunbreyð við kaffi/te

09.00 Vælkomin v/Synergi

09.05 **Grundleggjandi fíggjarlig hugtøk og orðingar**

- Aktivitetir ella botnlinja – hvat skal fyritøkan lata?
- Ver kunnug/-ur við tey mest neyðugu fíggjarligu hugtøkini

10.20 Steðgur við onkrum leskiligum

10.40 **Lær um mest týðandi meginreglurnar og hugtøkini í búskaparstýring og fíggjarætlanar arbeiði**

- Hvat er ein fíggjarætlan, og hvønn leiklut hevur hon?
- Fá størri kunnleika til mest nýttu hugtøkini í fíggjarætlanararbeiði
- Hvussu tryggjar tú eina effektiva fíggjarstýring á tíni deild?

12.00 Matarsteðgur

13.00 **Skil og nýt fíggjarlig dáta á bestan hátt**

- Fá kunnleika um ymisk sløg av roknskapum og búskaparfrágreiðingum
- Hvussu skulu frágreiðingarnar lesast?

**Ársfrágreiðingin – menn tína fatan av mest týðandi roknskapinum í fyritøkuni**

- Hvat er ein ársfrágreiðing/ársroknskapur?
- Hvørjar áhugabólkar er ársfrágreiðingin til?
- Hvat kann ársfrágreiðingin brúkast til?
- Hvat sigur ársfrágreiðingin um eina fyritøku?
- Hvat kanst tú lesa í tí, sum er skrivað - og í tí, sum ikki er skrivað?

14.30 Steðgur við onkrum leskiligum

14.50 **Roknskapargreining, nýtsla av lyklatølum og kritiskum parametrum**

- Samanhangur millum resultatuppgerð, javnvág og uppgerð av peningasrensli

16.00 Fyrsti dagur á skeiðnum endar - vit síggjast í morgin



**John Eli Andersson** hevur royndir gjøgnum mong ár sum undirvísari og rithøvundur á fíggjarøkinum.

John er uttanhýsis lektor á Ingeniørhøjskolen í Keypmannahavn og undirvísir m.a. á Handelshøjskolen í Keypmannahavn og á Syddansk Universitetscenter. Hann hevur nógvar vinnuroyndir sum stjóri og nevndarlimur, og hann hevur egna ráðgevingarfyritøku.

08.30 Morgunbreyð við kaffi/te

09.00 **Fá skil á innanhýsis roknskapunum**

Við støði í einum ítøkiligum modelli hyggja vit nærri at:

- Hvat er ein innanhýsis roknskapur / tíðarskeiðs-roknskapur
- Hvat skal tíðarskeiðsroknskapurin vísa?
- Hvat er grundarlagið fyri tíðarskeiðsroknskapinum?

10.20 Steðgur við onkrum leskiligum

10.40 **Soleiðis skapar tú bestu fortreytirnar fyri einum góðum fíggjarætlanar-arbeiði**

- Hvussu fært tú fatur á røttu vitanini?
- Hvørjum spurningum hevur tað týdning at finna svar á, fyri at fíggjarætlanargrundarlagið skal verða rætt?
- Soleiðis gagnnýtir tú fíggjar-ætlanir frá árunum framman-undan
- Hvussu skalt tú byrja, tá ið tú setir hol á fíggjarætlanar-arbeiðið?

12.00 Matarsteðgur

13.00 **Fá amboð at gera títt fíggjarætlanararbeiði meira trygt og einfalt**

- Hvat krevst fyri at fáa eitt gott fíggjarætlanararbeiði?
- Hvussu kanst tú byggja fleksibilitet inn í fíggjar-ætlanina?

**Hvussu fylgir tú best við í eini fíggjarætlan?**

- Hví hevur tað stóran týdning at fylgja við?
- Hvussu kanst tú hava eftirlit við, at fíggjarmálini verða fylgd?
- Soleiðis kanst tú tíðliga síggja frávik í fíggjarætlanini

14.30 Steðgur við onkrum leskiligum

14.50 **Soleiðis verður tú betri at formidla og leggja fram fíggjarligar boðskapir**

- Fá betri førleika at samskifta við starvsfelagar við økonomiskari bakgrund
- Soleiðis leggur tú títt tilfar fram fyri leiðsluna
- Hvussu kanst tú á einfaldan og áhugaverdan hátt leggja fram fíggarviður-skiftini fyri tína deild?

16.00 Skeiðið endar – takk fyri hesaferð!

# TAÐ PRAKTISKA

**Dagur:** 28. & 29. september 2010
**Kostnaður:** kr. 8.999,- + mvg. pr. luttakara.
**NB!** **Sami kostnaður sum í DK**
**Íroknað:** Skeið, skeiðtilfar, morgunmatur, frokost og kaffi í steðgunum
**Tilmelding:** á www.synergi.fo
**Freist:** 7. september 2010
**Avsláttur:** Tekna tit 3 samstundis, fáa tit 10% avsláttur.

**Treytir fyri frámelding**
Møgulig frámelding skal verða skrivlig og hon skal stílast til Synergi og sendast til synergi@synergi.fo, ella faxast til 322 329.

Við frámelding verður roknað umsitingargjald á 10% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding – tó í minsta lagi kr. 500,-.

Kemur frámeldingin seinni enn 30 dagar fyri skeiðsbyrjan verður roknað eitt gjald uppá 50% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding. 21 dagar (ella seinni) fyri skeiðsbyrjan verður eingin afturgjalding. Um tær ikki ber til at vera við, so ert tú sjálvandi vælkomin at lata plássið til ein starvsfelaga.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og møguligum broytingum í skránni.
Avsláttir kunnu ikki kombinerast.

Hesin faldari er ein svanamerktur prentlutur.

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

**"Super skeið og enn einaferð lógvabrestir til John fyri eitt gott skeið..."**
Maiken M. Kofoed, spesialist,
Københavns Brandvæsen